# urguleikarnir fáir



*Høvið varð eisini at royna nýggju urguna í Fríðrikskirkjuni. Oddvør Johansen treður her urguna meðan hon spælir nakrar útsetingar yvir føroysk løg, sum Jens Mortan Mortensen, formaður í Urguleikarafelagnum hevur gjørt. Aðrir royndir og minni royndir urguleikarar líða við áhuga á vakra spælið*

eigur eina vakra og ikki minst vælljóðandi urgu. Her hevur ein oftast havt eina traðkiurgu – ella pumpuorgul, sum summi nevna tað -, men sum var so illa farin, at hon ikki gjørdist aftur.

Her hevur Kirkjuráðið valt at skifta ta gomlu urguna út við eina spildurnýggja, - men hevur í hesum sambandi ikki í sama mun hugsað um, hvør persónur sum skuldi seta seg við hesa urguna.

Av hesi orsøk er støðan mangastaðni tann, at allar umstøður og allir karmar eru til at fáa gott undirspæl til sálmasangin, men at eingin er at fylla hesar karmar. Serliga ikki, um ein hugsar um at fáa hendur á urguleikarum sum eru væl útbúnir til hetta.

Fundur í Fríðríkskirkjuni eftirlýsti tí enn einaferð eina skipaða undirvísing í urguleiki og fyri verandi urguleikarar.

### Undirvísing og Musikkskúli

Hetta við undirvísingini av verandi urguleikarum og ikki minst av nýggjum, er ikki eitt nýtt mál.

Felagið fyri teir føroysku urguleikararnar hevur áður tosað bæði við landsmyndugleikarnar og teir kirkjuligu myndugleikarnar, men enn er so ikki hent stórvegis í hesum høpi.

Fyri at bøta um støðuna hava nógv uppskot verið frammi: Ein hugsan var at fáa eina skipaða tónleikalinju fyri kirkjutónleik lagda undir tann føroyska Musikkskúlan. Her hevði ein møguleika at fáa fatur á spírum til komandi urguleikarar.

Hugsanin var her, at ein t.d. lat næmingarnar ganga til undirvísing í klaveri trý tey fyrstu árini, fyri síðani at bjóða teimum undirvísing í urguspæli, bæði við elektriskari urgu og við kirkjuurguna, sum summi skýra sum drotning ljóðføranna.

Við hesum varð vónað, at ein kundi fáa ein hóp av ungum fólkum, sum so líðandi vildu átaka sær uppgávuna sum urguleikarar við tær føroysku kirkjurnar.

Hugskotið er gott, men enn er so ikki nógv ítøkiligt hent á hesum økinum. Eingin ivi er tó um, at tørvurin á nýggjum urguleikarum minkar ikki, so hvørt sum árini líða.

### Munur á kirkjutænarum?

Ein annar afturvendandi spurningur er løn ella samsýning til urguleikararnar: Skulu teir hava samsýning fyri tænastuna? Vilja teir hava samsýning fyri tænastuna? Ella skal tað vera neyðugt við eini samsýning fyri at fáa urguleikarar?

Onkur vil helst siga sum so, at ber tað til í framtíðini at hava eina kirkju við vælútbúnum urguleikarum sum haraftrat skulu hava eina tilsvarandi løn fyri arbeiðið ella tænastuna, teir gera? Og hvussu við hinum kirkjutænarunum, ið eisini gera ein stóra og trúfastan gerning í teirri kirkjuni, teir eisini eru so góðir við. Skulu hesi fólkini so eisini lønast?

Skal ein til at gera mun á einum klokkara sum "bara" ringir. Ella er tað meiri, at fyrireika seg frammanundan við einum lestri ella við at venja sálmarnar, enn hjá einum øðrum kirkjutænara, sum ikki hevur hesar fyrireikingarnar frammanundan fyri neyðini?

Urguleikarin er í øllum førum í teirri støðuni, at hann skal kenna sálmarnar frammanundan gudstænastuni. Spælir hann við eina av størru kirkjunum krevur hann eisini at finna fram tað urguljóðið sum sálmateksturin leggur upp til.

Men hvussu í teimum smærru kirkjunum á fjarskotnum plássum? Tær hava ikki altíð so lætt at fáa fatur á urguleikarum, og kunnu tí í framtíðini verða noyddar at fáa sær áðurnevnda tól, har urgan í roynd og veru spælir sjálv.

Tað er ikki øll sum dáma hesa loysnina. "Tað ljóðar so kalt, tá tað er ein maskina sum spælir", tók ein til.

### Samsýning ella ikki

Spurningurin um samsýning er tí eisini viðkomandi í hesum prátinum. Summastaðni eru urguleikararnir settir í starv við fastari løn, meðan teir aðrastaðni ikki fáa nakað aftur fyri.

Eitt uppskot um hetta er gjørt, har ymsir tættir í viðurskiftunum hjá urguleikarunum eru tikin upp. Ein av spurningum er samsýningin fyri at spæla, - ein spurningur sum ikki er eins væl dámdur av øllum, m.a. tí at slíkt hevur ikki verið siðvenja í Føroyum.

Í hesum uppskotinum verður m.a. skotið upp at samsýningin verður roknað út í mun til fólkatalið í bygdini, av teirri einfaldu orsøk at í smáum bygdum eru færri herðar at bera hesar byrðarnar.

Skal ein skipan av hesum viðurskiftum setast í verk, er neyðugt við løggávu á økinum. Henda finst ikki í dag, og tí eru umstøðurnar so ymiskar frá einum plássi til annað.

Víst verður m.a. til eina danska lóg, sum sigur at tað einans kunnu setast urguleikarar í starv í støðum, har tað búgva fleiri enn 2000 fólk. So henda skipanin hevði riggað sera illa til okkara serføroysku viðurskifti.

Tí liggur enn ein stórt arbeiði eftir at gera, fyrrenn hesin spurningurin verður loystur.

Ella sum sagt varð á fundinum: "Neyðugt er at hyggja frameftir. Tí mugu vit broyta siðvenjur og hugsa um framtíðina hjá kirkju okkara".

### Flyta kirkjutíðina fyri urguleikaran

Aðrastaðni hevur ein funnið fram til heilt aðrar loysnir, við at fáa fólk úr øðrum bygdum ella býum at røkja hesa tænastuna við gudstænastuna. Eitt dømi um hetta er við kirkjuna í Hvannasundi, har annar urguleikarin kemur úr Klaksvík, tá hann eigur at spæla.

Og í norðaru helvt av Suðuroynni hevur ein lagt gudstænastutíðirnar soleiðis, at urguleikarin spælir við eina kirkju til vanliga kirkjutíð kl. 11, og síðani kann hann røkka til hina seinnu kirkjuna, hvørs gudstænasta byrjar kl. 12:30.

Uppaftur í øðrum kirkjum er eingin urga ella ein teldustýrd urga. Í Kirkjubøar kirkju finst eingin urga, so har verður sálmasangurin stýrdur av einum forsanga. Hetta sama ger seg eisini galdandi við aðrar kirkjur í landinum.



*Teir báðir hava felags bakgrund og hava nógv at práta um, tá tað snýr seg um urguleik – vm. Heðin Askham Olsen, sum vit kenna úr tónleikabólkinum "I Am" og sum er urguleikari við Hvannasunds kirkju, og Jónsvein Eliassen urguleikari við Leirvíkar kirkju. Millum teir báðar sæst enn ein kendur tónleikari, Ólavur Hátún*

### Teldustýrd urga

Við Gjáar kirkju var ein í teirri støðuni, at tá eingin urguleikari var, mátti ein finna fram til eina heilt aðra og meiri tøkniliga loysn.

Har hevur ein tí útvegað sær eina teldu, hagar allir sálmarnir eru spældir inn, og har ein bert við at trýsta á knøttin "play", kann spæla allar sálmarnar í sálmabólkini til felagssangin. Øll aftursvarini undir gudstænastuni kunna somuleiðis fáast fram úr hesum tólinum.

Tá talan er um tænastuna sum urguleikari, so tosar ein ikki bert um ta vanligu gudstænastuna sunnudag. Her er eisini talan um allar gudstænasturnar í samband við tær stóru høgtíðirnar – jól, páskir og hvítusunnu – kanska einar 70 um árið.

Umframt hetta er somuleiðis talan um urguspæl, tá kirkjufólkið savnast við gleði og sorg í mannalívinum: Tá barnadópur og giftarmál eru, men eisini tá jarðarferð er á skránni.

Hesar tænastu eru ójavnar frá einum staði til annað, men serliga við kirkjurnar í høvuðsstaðnum eru nógvar tænastur av slíkum slagi.

## Tann øvugta verð í Noregi

Í Føroyum hava nógvar kirkjur góðar og kostnaðarmiklar urgur, men hava samstundis trupult við at "manna" tær.

Ein luttakari á fundinum vísti til eitt dømi úr Noregi, har støðan als ikki kundi samanberast við hana her hjá okkum, tá ein kirkja skuldi útvega sær eina urgu. Talan var í roynd og veru um eina fullkomuliga øðrvísi hugsan.

Í hesum døminum mátti ein í longri tíð gera eitt stórt arbeiði fyri at fáa røttu myndugleikar at skilja týdningin av at kirkjan mátti hava eina nýggja urgu. Men tá so urgan var komin í kirkjuna, var als eingin trupulleiki at fáa játtan til ein vælútbúnan urguleikara.

– Í Føroyum er tað næstan øvugt, segði hesin urguleikarin.

## Lønt fólk og tómar kirkjur

Í samband við fundin fyri urguleikarar kom í farnu viku ein viðmerking við telduposti til redaktiónina á Sosialinum.

Her verður m.a. tosað um teir profesjonellu urguleikararnar sum ein spurning, ið avgjørt eigur at verða tikin upp í kirkjuni.

– Skulu vit gjalda nógvan pening fyri hesar væl útbúnu urguleikararnar í kirkjum okkara? Hvat við hinum kirkjutænarunum – klokkara og dekni?, varð spurt.

Tað kann vera so lætt, bara at betala seg frá øllum, tá kirkjan bara kann álíkna meiri í kirkjuskatti frá fólki.

– Men tann stóri spurningurin er: Fáa vit eina betri kirkju burtur úr tí?

– Er ikki vandi fyri, at vit fáa danskar tilstandir í Føroyum: Løntar kirkjutænarar og tómar kirkjur?!

## Nútíðar sálmar vanta

Eitt av málunum hjá Urguleikarafelagnum verður at skipa fyri einum skeiði fyri tey, ið hava hug at skriva nútíðar sálmar. Hetta skal eftir ætlan gerast í samstarvi við Prestafelagið og Rithøvundafelagið.